# Loppumarknaðurin gav væl av peningi

BREKAÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Fólk argaðust rættuliga inn á tíðindini um hvussu mannminkandi tað er fyri brekað og foreldur á Eirargarði, at neyðugt er við einum loppumarknaði fyri at fáa ein buss til at flyta búfólkini til og frá stovninum. Av teimum 15 búfólkunum sita átta í koyristóli, so neyðugt skuldi ikki verið við nakrari kanning ella viðgerð frá almennari síðu fyri at staðfesta at tørvur er á nøktandi flutningsmøguleikum á slíkum stovnum.

Áðrenn allar sjálvfylgiligheitirnar, so skulu vit beinanvegin nevna, at inn komu 75.000 krónur umframt 3000 krónur, sum sjafførar hjá auto savnaðu inna sínamillum

Og einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt, tí tá loppumarknaðurin í Sjónleikarhúsinum lat upp leygarmorgunin, var stúgvandi fult av fólki uttanfyri og teir fyrstu tríggjar tímarnar var Sjónleikarhúsið stappað, fólk stóðu sum sild í tunni.



Køkutombolaið fekk bein av ganga á. Sandkøkurnar ruku fyrst, síðan morengsið og allar seinast smákøkurnar, harav pleskurnar hvurvu seinast av diskinum.

Inni í sjónleikarhúsinum var loppumarknaðurin og har nógv av nipsi av fáa. Nógv klæðir og ikki um at tala skógvar, sum antin vóru for lítlir ella so grúsama nógv ov stórir. Skógvarnir vóru spildur nýggir av bestu merkjum og var tað ikki støddin, so hevði ein rættuliga kunnað gjørt kubbi.

Tú sá fólk standa og handla skógvunum, meðan tey antin ynsktu at høgt var at hæli og tá, ella at føturnir vóru størri. Einir flunkandi nýggir Ecco nummar 47 lógu ovast á rúgvuni leingi, onkur kandidatur var til teir, men ongin tordi rættuliga. Nú prýða teir føturnar hjá vicevertinum fyri øllum bústovnunum í Havn,og hann gongur errin, sum ein annar Pjerrot úr Tivoli, og svingar á tærnum í nýggja fótafarinum.

Fyrireikararnir, ið eru starvsfólk á bústovnunum, eru vælnøgd við tiltakið og tey eru takksom eisini. Tað sum ikki varð selt av klæðum fór oman á Skipafelagið. Higani verður tað sent til Russlands, har tørvurin er stórur á øllum.

## Sjafførar stuðla brekaðum

BREKAÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Taxasjafførar hava stórt hjarta. og tá tíðindini um vánaligu flutningsmøguleikarnar hjá brekaðum á bústovnunum á Eirargarði spurdust í seinastu viku, so fóru taxasjafførarnir á bilstøðini AUTO beinanvegin til verka.



*Sjafførarnir hjá AUTO stuðlaðu teimum brekaðu dyggiliga*

Taxasjafførarnir savnaði sínamillum ikki færri enn 3000 krónur, sum teir lótu óskerdar til komandi bussin hjá teimum brekaðu. Og óskoytið frá taxasjafførunum gjørdi, at samlaði inntøkan frá loppimarknaðinum táttaði fast í 80.000 krónur.

Og taxasjafførar kenna betri enn nakar, hvussu torført tey rørslutarnaðu brekaðu hava tað á Eirargarði, tí tað eru teir, sum oftast flyta tey.

### Ford vil hjálpa

Bilasølan Ford hevur bjóðað seg fram at hjálpa búfólkunum á bústovnunum á Eirargarði við einum nýggjum tíðarhóskandi bussi, sum altíð kann vera tøkur at flyta tey. Tilboðið frá bilasøluni kom á loppumarknaðinum í Sjónleikarhúsinum leygardagin.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa at vita smálutirnar í hesum tilboði, tó stjórin var farin uttanlands í gjár.

**je**

## Bussar til brekað ikki hægstu raðfesting

BREKAÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum heldur ikki, at tey brekaðu á bústovnunum eru so illa fyri, tá tað snýr seg um flutning.

– Eg dugi ikki at síggja, at vit skulu brúka fleiri milliónir upp á eina busspark, soleingi sum sjálvur íbúðartørvurin hjá brekaðum ikki er nøktaður. Bussar til búplássini er ikki hægsta raðfestingin hjá mær akkurát nú. Og serforsorgin metir heldur ikki, at tað er ráðiligt at játta pening til busskeyp við verandi játtan, sigur Páll á Reynatúgvu.



*Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður*

– Talan er um fleiri milliónir, skulu allir bústovnarnir hava buss. Talan er um seks bústovnar og tvey arbeiðspláss og siga vit at ein bussur kostar 420.000 krónur, so koma vit lættliga upp á eina íløgu upp á 3.3 milliónir krónur, sum so aftur skal gerast, tá bussarnir eru slitnir um eini seks ár. Eg haldi, at tað er týdningarmiklari, at øll fáa eitt pláss at búgva, áðrenn vit fara at hugsa um flutning, sigur Páll á Reynatúgvu.

– Og hyggja vit eftir, so er tað ikki heilt illa statt við flutningi. Teir einstøku bústovnarnir hava játtan til at leiga bil og buss. Eisini er Serflutningsskipanin tøk, sigur hann.

– Men sjálvandi, eg heilsi tiltøkum, har bústovnarnir sjálvir skaffa pening til vega, fyri at fáa ein buss vælkomin, sigur Páll á Reynatúgvu.



Tom Stowe, løgmaður í Hetlandi um nýggju Norrönu:

# Taka um endan gerst tað neyðugt

**- Eg beri ongan sum helst ótta um hesa verkætlanina. Tá vit seta pengar í hana er tað tí vit trúgva uppá hana og ætla vit eisini at fara allan vegin, helst eisini um tað verður neyðugt við almennum stuðuli í ringum tíðum sigur hetlendski "løgmaðurin", Tom Stowe við Sosialin**

NÝGGJ NORRÖNA
*Jan Müller*

Millum mongu gestirnar til sjósetingina av nýggju Norrönu í Lübeck herfyri vóru eisini fleiri umboð fyri Hetland. Hetta m.a. tí, at hetlendingar hava sett 50 mill. kr. í nýggju Norrönu. Teir eru eisini við at umbyggja havnina til at kunna taka ímóti hesum nýggja farinum, sum skl byggja brýr millum Hetland og grannalond tess. Millum hetlendsku umboðini var eingin minni enn "løgmaður" Tom Stowe.

Tome Stowe er leiðari, "convenor" í hægsta fólkavalda tinginum í Hetlandi "The Shetland Island Council". Hetta kann ikki sammetast við okkara løgting, tí teir støða mótvegis Bretlandi kann ikki sammetast við okkara í danska kongaríkinum, men ein kann siga, at hansara starv kemur nærmast einum løgmanni her hjá okkum. Tom Stowe hevur røkt hetta mest týðandi embætið í Hetlandi seinastu trý árini.

Eftir sjósetingina av nýggju Norrönu hitti Sosialurin Tom Stowe, sum ikki dylur fyri, hvussu fegin hann eins og alt hetlendska fólkið er fyri samvinnuna við Smyril Line og Føroyar sum heild.

- Vit eru bert 200 fjórðingar úr Føroyum. So tað er greitt, at her eigur at verða knýtt samband á øllum økjum, og til tess er avgerandi neyðugt við einum skipi sum Norrönu. Samstarvið kann tá fevna um allar hugsandi samfelagstættir, frá olju og ferðafólki til mentan og fótbólt.

Tom Stowe heldur tað ikki vera ósannlíkt, at eitt tættari samstarv við føroyingar í framtíðini kann vera við til at vekja úr dvala teirra upprunliga tætta tilknýti til Norðurlond – vera við til at hetlendingar aftur finna sín upprunaliga samleika. - Vit kenna okkum í veruleikanum tættari knýtt at Norðurlondum og tí norðurlendska enn til Skotland, her ikki minst tá hugsað verður um søguliga fortíðina. Vit kenna okkum 90% sum hetlendingar, 1 til 2% sum skotar og væl fleiri % sum norðbúgvar leggur hann aftrat.



*Tome Stowe, "løgmaður" í Hetlandi her saman við konu síni í Lübeck til sjóseting av nýggju Norrönu*

*Mynd Jan Müller*

Tom Stowe dylur ikki fyri, at Norrøna kann fáa stóran týdning fyri Hetland. Men eisini øvugt. –Vit kunnu vera við til at fáa fleiri ferðafólk til bæði Føroya og Íslands. Ferðafólk í dag vilja ikki bara hava sól, men tey vilja uppliva náttúru og nakað stórt. Tað fáa tey í Føroyum og í Íslandi.

Hetland gjørdi herfyri av at seta 50 mill. kr. í nýggju Norrönu. Hví gjørdu teir tað spurdu vit Tom Stowe: - Tað er tí at vit trúgva uppá hesa verkætlanina. Vit halda tað er rætt at finna ein avloysara til verandi Norrönu, sum er vorðin ov lítil og ótíðarhóskandi.

- Men tað eru tey, sum halda, at henda farleiðin ber ikki eitt skip fyri 710 mill. kr? Heldur tú eitt privat felag sum Smyril Line megnar at fáa hetta at mæla runt?

- Ja tað geri eg avgjørt.

- Men um vit fáa ringar tíðir, heldur tú tá , at hetlendska tingið er hugað fyri at seta almennar pengar í verkætlanina fyri at hon ikki skal detta niðurfyri?

-Tað er sjálvandi ilt hjá mær at svara her. Men nú vit eru farnir inn í hetta projektið, so rokni eg eisini við, at vit vilja fylgja tí allan vegin. Og um neyðugt uttan iva eisini at stuðla tí í ringum tíðum. Men eg trúgvi ikki, at hetta fer at verða neyðugt. Men sum sagt: vit síggja fegnir, at henda verkætlan ikki dettur niðurfyri aftur.

- Men hví ikki heldur sigla til Aberdeen enn til Lervick?

- Eg haldi tað er gott, at hon siglur til Hetlands. Higani er gott samband víðari til Aberdeen.

Tom Stowe sær eisini stórar møguleikar fyri samvinnu á oljuøkinum millum Hetland og Føroyar. Hann heldur, at bæði samfeløgini uttan iva at hava nakað at lata hvørjum øðrum og hugsar her ikki minst um Sullom Voe oljuterminalin í Hetlandi, sum føroyingar kunnu brúka verður olja funnin.

Annars heldur hann, at mentanarliga samsvinnan eigur at mennast og vísir til "The Jacobsen Papers". - Vit hava júst havt fund í mentanarnevndini í tingi okkara, har vit samtyktu at menna og raðfesta hægri mentanarliga samstarvið við føroyingar. Tit koma at rógva og spæla fótbólt hjá okkum og vit koma til tykkara – fyri bert at taka tvey dømi.

Hann heldur tað annars vera rættiliga náttúrligt, at oyggjabúgvar sum hetlendingar og føroyingar knýta tættari bond, bæði tá hugsað verður um ta samvinnu, sum var fyrr og um tørvin, sum framtíðina hevur at bjóða uppá.

- Eg ynski føroyingum hjartaliga tillukku við nýggju Norrönu og kann lova, at vit í Hetlandi fara at gera okkara ítarsta fyri, at hetta verður ein varandi loysn.



*Vit fara ikki at sleppa nýggju Norrönu uppá fjall koma ringar tíðir sigur ovasti leiðarin í Hetlandi, Tom Stowe*

*Mynd Jan Müller*

# Agip leitar eftir boripalli til Føroyaøkið

**Um somu tíð sum Amerada Hess fer undir at bora beint hinumegin markið er oljufelagið Agip farið at leita eftir hóskandi boripalli til sína boring næsta summar**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Nakað um somu tíð sum boriskipið West Navion er komið á Atlantmótið at bora ein týðandi brunn fyri The Faroes Partnership við Amerada Hess, Dong, British Gas og Atlants Petroleum er italska oljufelagið Agip farið út á heimsmarknaðin á leita eftir einum hóskandi boripalli til sína fyrstu boring við Føroyar nakrantíð. Agip, sum saman við Føroya Kolvetni, hevur fingið loyvi at bora eftir olju og gassi, skuldi eftir røttum havt borað í ár. Men úrslitið av teimum trimum fyrstu boringunum á landgrunninum í fjør gjørdi, at Agip eins og hini feløgini hildu tað vera neyðugt at endavenda øllum tí seismiska tilfarinum umframt at fáa skotið nýggjan seismikk.

Á oljumessuni í Stavanger í farnu viku kom fram, at Agip fyri góðari viku síðani lýsti eftir boripalli til at bora í næsta ár, í fyrsta lagi í mai men helst nærri sumrinum enn tað. Ikki so nógvir pallar eru, sum kunnu arbeiða í hesum djúpa farvatninum, so tað ræður um at vera tíðliga úti.

Sosialurin skilur annars, at endurskoðanin av seismiska tilfarinum og nýggi seismikkurin felagið hevur fingið til vega í ár hevur gagnað samtakinum, soleiðis at man heldur seg at hava funnið rætta staðið at seta hol á.

Sum er eigur Agip 93% av loyvinum. Føroya Kolvetni eigur tey 7% men kann fáa upp í 22%, um tað ynskir og megnar tað. Tað er enn ógreitt, hvat Føroya Kolvetni fer at gera, men neyvan er hugsandi, at Agip fer undir eina boring í 250 millióna klassanum við 93% av váðanum. Tí verður millum oljufólk gitt, at Agip roynir at fáa okkurt annað oljufelag at "farma" inn í samtakið og taka ein part av váðanum á seg. At tað ikki hevur eydnast enn kann hava nakað við boriúrslitini á landgrunninum higartil at gera. Og so tað at feløgini uttan iva standa í bíðistøðu og vilja kenna úrslitið av boringini hjá Amerada Hess við markið fyrst.

Føroya Kolvetni hevur fleiri ferðir ætlað sær á børsin í London at fáa pengar til sín part av boringini. Hetta hevur so verið útsett. Felagið skal hava pening sín kláran eitt hálvt ár innan boringina, og verður borað á sumri næsta ár, so nærkast. Tí má roknast við, at Føroya Kolvetni fer at gera eina roynd at koma á London partabrævamarknaðin í hesum árinum. Um tað so "bara" er at fáa fíggjað tey verandi 7% ella tað er til eina nógv hægri luttøku uppá 22% er óvist.

Boringin hjá Agip vil sjálvandi hava stóran týdning fyri áhugan fyri føroyska økinum. Gongur t.d. ikki sum ætlað hjá Amerada Hess við tí boring, sum byrjar í dag sum ein annan dag, so fara øll eygu at vera vend móti Agipboringini næsta ár. Gevur hon heldur einki úrslit, so standa aðrar boringar á skránni hjá Statoil, BP og Hess í 2004. Men tað er greitt, at eisini hin boringin hjá Hess í bretskum øki longur norðuri og skamt frá loyvinum hjá Agip, Cambo, kann fáa stóran týdning fyri Føroyaøkið. Skuldi hon eydnast vil hon sjálvandi gera Agiployvið uppaftur meira áhugavert, og eitt gott úrslit av tí boringini vildi so eisini skundað undir eina næstu útbjóðingarrundu. Tað er greitt, at fyri Agip hevur tað ikki so lítið at siga heldur, hvat úrslitið verður av Cambobrunninum, men óvist er í løtuni, um hann verður boraður, áðrenn Agip setur sín bor í næsta ár. Ætlanin hjá Hess var at bora Cambobrunnin í ár eisini, men tað verður ivasamt, nú West Navion varð so nógv seinkað. Tað hevur ljóðað, at Hess fyrst fór at bora Cambobrunnin og bíða við hesum, sum hevur tilknýti til fundið á landgrunninum í fjør. Men tær gitingarnar eru so ikki beinar.

Fyri Føroyar og fyri tey oljufeløgini, sum hava valt at gera risastórar íløgur her hjá okkum er tíðin, sum liggur fyri framman, sera spennandi og avgerandi. Verður einki funnið nú, so eru kortini ikki allar súðir syftar. Oljuleiting er ein longri prosess, og nøkur fá turr hol nýtast ikki at vera nakað endaligt svar. Tað má tol og fyrireiking til.

West Navion boriskipið kom á borilokalitiónina í vikuskiftinum og skuldi fara undir at bora fyrst í vikuni. Nú veðrið hevur verið so vánaligt er ivasamt, um boringini byrjar alt fyri eitt.